LM-099/2023

Fylgiskjal 8

Hoyringarskriv til

Lógtingslóg
um
Burðardygga ferðavinnu

Dagfesting: 16. Februar 2024

Her skal allur lesnaður skiljast sum at eg greiði frá hvat mín hugsan er, og bara mín. Eg royni eftir førimuni at brúka somu allýsingar sum sambært lógaruppskotinum eru lýstar í §2.

1. §3 eigur at verða ætla til føroyingar og ikki til ferðafólk.
   Hetta sigi eg tí at ein og hvør eigari ella brúkari skal kunna nokta ferðafólkið at hava almennar gøtur at ganga á inniá sínum haga, tó so má vísast til §5 ísamband við handilsliga ferðavinnu.
   Og verður §3 ætla bara føroyingum, skal hon gerast linari við at føroyingar hava fríðari rásir at fylgja, fyri at nærum verðuliga ferðast frítt í føroysku náttúruni. Einki er so týdningarmiki sum at føroyingar hava nærum frítt frælsið at ferðast í náttúruni.

2. §7 her skrivi eg ikki alt niður, men skrivi tað eg hugsi er mest umráðandi.
   í samband við at kommunan skal gera ferðavinnuætlan, har hon saman við heimafólkið velur og ger almennar gøtur (helst verðandi bygdagøtir). Beinleiðis ætla til almenna ferðslu uttangarðs hjá ferðafólkið.
   Saman við heimafólkið virðir og lýsir eigarans og brúkarans ferðavinnuligu áhugamál at selja náttúruna við móttøku høllum. Hvar útfrá móttøku høllini skal eigari ella brúka kunna krevja gjald fyri víðari at ferðast í náttúruni. Við ella uttan ferðaleiðara.

3. §8 eigur at ljóða eitt sindur annaðleiðis. Kommunan skal í samráð við eigara og brúkara, viðkomandi mynduleikar og stovnar merkja upp og gera nýggjar farleiðir ið eru almennar til ferðafólk til tess at skipa ferðsluna uttangarðs.

Ragnar Dalsá:
Røktingarmaður og óðalsfólk í
hagapartinum Líðin Leiti Húsar

Tlf. 269974